

## Konan styðjar Brown

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, avsannar, at hann stundum kann finna upp á at tveita skrivstovuútgerð eftir gólvinum av berari øði. Bretskir fjølmiðlar skrivaðu fyrr í ár, at Gordon Brown hevði tveitt fartelefonina frá sær, so hon brast í veggin á skrivstovu hansara, og um vikuskiftið kom fram, at hann kann finna upp á at tveita bæði skrivimaskinur og kopimaskinur eftir gólvinum. Men forsætisráðharrin avsannar tíðindini. Hann ásannar, at forsætisráðharrastarvið kann vera krevjandi, men sigur, at hann fær góðan stuðul frá konuni, Sarah, og teimum báðum børnunum.

## ES-limaskapur kostar

ES hevur sett stjórnini í Kroatia fleiri krøv, sum landið skal lúka, áðrenn tað kann fáa ES-limaskap, sum tað hevur søkt um. Kroatiska stjórnin sigur, at tað fer at kosta ríkiskassanum meiri enn eina hálva milliard evrur at fremja tær ábøtur, sum ES krevur. Á fíggjarlógina fyri 2010 hevur stjórnin sett 273 milliónir evrur til endamálið, og hon sigur, at tað verður neyðugt at játta aðrar 277 milliónir evrur í 2011. Eitt nú hevur ES kravt, at Kroatia skal laga sítt marknaeftirlit eftir Schengen-reglunum. Kroatiska stjórnin vónar, at landið kann fáa limaskap í ES í 2011.

# Jóanes ger fordómunum til skammar

**Fordómarnir hjá Katrin Ottarsdóttir um superføroyingin og mikla skaldið Jóanes Nielsen verða dygiliga gjørdir til skammar í hennara nýggja filmi um rithøvundan, sum verður frumsýndur hóskvøldið**



*Úr broti frá filminum, har Jóanes Niesen lesur yrkingar fyri konuni Rannvá*

*Mynd: Bluebirdfilm*

FILMUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Við filminum *Sporini vaksa úr orðum* um rithøvundan Jóanes Nielsen er Katrin Ottarsdóttir nú komin á mál við síni ætlan at lýsa trý føroysk listafólk og kanska finna inn til kjarnuna í teirra skapanartrongd. Seinasti filmurin í røðini verður frumsýndur komandi hóskvøld, tá eisini høvuðspersónurin Jóanes Nielsen fyrstu ferð sleppur at síggja, hvørji spor hann hevur sett eftir seg í myndunum og huganum hjá føroysku filmskvinnuni.

### Ræðandi kommunisturin

Kanska var tað ikki uttan orsøk, at Katrin Ottarsdóttir bíðaði við filmsportrettinum av Jóanesi Nielsen til síðst. Í øllum førum var hon hesuferð veruliga noydd at taka dik á seg, áðrenn hon tordi at seta seg í samband við skaldið um sína ætlan, viðgongur Katrin Ottarsdóttir, sum heldur, at filmurin man vera íbirtur av hennara egnu fordómum um Jóanes.

– Sjálvt um eg bara eri fýra ár yngri enn Jóanes, so virkaði hann altíð so øgiliga vaksin og ræðandi í síni sannføring. Hesin álvarsami, mytugyrdi maður, sum altíð hevur verið ein partur av býarmyndini í mínum heimbýi – antin á prutli ella í djúpum tonkum við hondunum handan bak gjøgnum havnargøtur. At síggja til var hetta ikki ein maður, ið tók tilveruna við løttum, minnist hon.

Og ikki bara tað. Hartil var maðurin yrkjari og livdi sína kommunistisku sannføring fult og heilt sum fiski- og arbeiðsmaður. Eisini støðu hansara atfinningarsomu og bersøgnu lesarabrøv ofta at lesa í bløðunum, so hetta var sanniliga ikki hvør sum helst í eygunum á ungu havnargentuni.

### Mátti røkka ella støkka

– Nei, Jóanes var bara ikki ein persónur, tú kundi fara yvir at tosa við uttan at føla teg býttan og heilt við síðuna av. Eg var sannførd um, at ein sovorðin sum eg ikki fór at finna náði í hansara atfinningarsomu eygum. Og tað gjørdi tað ikki betri, at eg var av heili tveimum svornum javnaðarfamiljum. So eg var vís í, at vit neyvan nakrantíð fóru at hava nakað við hvønn annan at gera.

Tí var tað eisini við bivandi hjarta at Katrin Ottarsdóttir, asfaltføroyingurin í Danmark, fór í gongd við hendan filmin um superføroyingin og mikla tjóðskaparmannin Jóanes Nielsen. Fór hann at gjøgnumskoða hennara intellektuellu og politisku fákunnu og avskriva filmsprojektið sum óseriøst og popput?

– Tíbetur eri eg so mikið treisk, tá tað snýr seg um at gera film, at valdi bara at leypa beint út í tað. So mátti tað røkka ella støkka. Og eg kann bara siga, at allir mínir fordómar vórðu dyggiliga gjørdir til skammar, sigur Katrin Ottarsdóttir, nú filmurin er klárur so »øll tit harúti kunnu læra hendan stóra mannin at kenna«, sum hon tekur til.

### »Býttu« spurningarnir bera

Katrin Ottarsdóttir hevur áður gjørt filmar um listamenninar Hans Paula Olsen og Tórodd Poulsen, sum eins og Jóanes eru úr Havn.

Hennara mál við filmunum var frá byrjan at leita inn til menniskjað handan listafólkið og listina og vita, um tað bar til at finna inn til sjálva kjarnuna í skaparatrongdini. Bæði fyri Katrin Ottarsdóttir og áskoðaran skuldi filmarnir vera ein ferð inn í ókent land við forvitninum sum fremstu drívmegi.

– Eg síggi fyri mær nakrar filmar, sum ikki eru bangnir fyri at seta nettup teir forvitnu og »býttu« spurningarnar, sum fólk oftast ikki tora at seta listafólkum, segði Katrin Ottarsdóttir, tá hon fór undir filmsverkætlanina, har tað ópoleraða og spontana skuldi vera tað berandi bæði í formi og innihaldi.

Allir tríggir filmarnir eru sokallaðar »one woman, one camera« framleiðslur, tað vil siga at Katrin Ottarsdóttir er bæði leikstjóri, myndakvinna og klippari.

*Sporini vaksa úr orðum* verður frumsýndur hóskvøldið klokkan 20 á Meiarínum, Tjóðpalli Føroya.




### FAKTA

Leikstjórn, upptøka & klipping: Katrin Ottarsdóttir.
Hugskot: Hugin Eide & Katrin Ottarsdóttir.
Ljóðbland: Iben Haahr Andersen.
Framleiðandi: Hugin Eide.
Framleiðsla: Blue Bird Film © 2009.
Longd: 75 minuttir (+ eykatilfar á fløgu-útgávuni).
Undirtekstir: Danskir og enskir.
Frumsýningar: 3. desember 2009 á Meiarínum, Tjóðpalli Føroya, í Havn. Donsk frumsýning í februar 2010 á Bryggjuni í Keypmannahavn.